## Spælari myrdi áskoðara

Miðvallarleikarin Javier Florez, sum spælir við kolumbianska felagnum Atletico Junior hevur skotið og dripið ein áskoðara. Orsøkin var, at áskoðarin hevði funnist at Florez og kann hann fyri elendigan, tí Atletico Junior tapti dystin um meistaraheitið. Hetta var ov mikið hja Florez, sum tók ein revolvara og skeyt 27 ára gamla áskoðaran. Tað boðar tíðindastovan Reuters frá. Bold. dk, sum eisini skrivar um hendingina, sigur víðari, at 1994 var eisini eitt skottilburður í kolumbianskum fótbólti, tá landsliðsverjuleikarin Adreas Escobar varð skotin og dripin, eftir at hann gjørdi sjálvmál í einum landsdysti.



## Berlusconi ynskir sámiligar prísir

Fótbólturin má endurskoðast og koma aftur á rætta kós, sigur Silvio Berlusconi, eigari av italska felagnum AC Milan. Hann hevur júst selt brasilianska Kaka til Real Madrid fyri 500 milliónir krónur, sum eisini keypti portugisiska Ronaldo fyri 700 milliónir krónur. Hóast hann yvir fyri Gazetta dello Sport hevur sagt, at teir sjálvt fegnast um tær hundraðtals milliónirnar, so er tað umráðandi, at prísirnir aftur koma á eitt sámiligt støði, sum hann tekur til.

# man nakrantíð



Føroysku flogbóltskvinnurnar góvu oyggjaleikunum best hugsandi føroyska endabrestin, tá tær í einari dramatiskari finalu vunnu 3-2 á Saaremaa – millum annað við sterkastu afturkomuni, nakað flogbóltslið nakrantíð hevur havt í einari oyggjaleikafinalu
Mynd: Álvur Haraldsen

### Ófatiligur endi

Nú stóð á jøvnum 2-2 í settum, og tað merkti, at talan gjørdist um ein fimmsettara, og nú slapp dramatikkurin enn eina ferð at standa sína roynd – eins og føroyska sálarfrøðin veruliga slapp at vísa, hvør dugur var í henni. Tað skuldi eisini vísa seg at gerast avgerandi í síðsta enda.

Saaremaa tóktist hava størri yvirskot, men í endanum av settinum kom føroyska styrkin til sjóndar. Tá støðan var 13-13, hevði Sólvá Dimon avgerandi smasjið til 14-13, ið tryggjaði okkum servuna og bæði sett- og matsjbólt. Men servan fór aftur um baklinjuna, so nú stóð aftur á jøvnum, 14-14.

Føroysku kvinnurnar vóru tó góðar í móttøkuni og fingu í lag álop, sum endaði við, at Karin Mikkelsen høgdi til, so tað bleiv 15-14 – og enn eina ferð sett- og matsjbóltur. Helen á Lakjuni fekk heiðurin at serva fyri Føroyar, og tá Saaremaa ikki fekk bóltin yvirum aftur, var sigurin upp á 16-14 í settinum og 3-2 í dystinum komin undir land. Gullið var enn eina ferð endað í Føroyum.

Lítið er at ivast í, at onkur finala hevur verið betri spæld enn henda, men eingin hevur havt sama dramatikkin. Og ongantíð er eitt lið komið so sterkt aftur, sum tað føroyska, ið bardi seg uppaftur og gav oyggjaleikunum besta hugsandi endabrestin!

Flott, flott, flott!!!

aftur, og tað bar allan vegin, segði Kristian, ið næstan ikki hevði nakra rødd eftir, tá dysturin var lokin og gullið vunnið.

Hann duldi heldur ikki fyri, at hann var ótrúliga glaður og fegin, og hann staðfesti somuleiðis, at hesin sigurin endar ovast í savninum yvir upplivingar:

– Eg eri næstan málleysur, tí hetta var heilt, heilt, heilt fantastiskt. Hetta er tað besta, eg havi upplivað í flogbólti. At vit so skuldu vinna 16-14 í fimta setti oman á tað heila, er bara púrasta ótrúligt. Eg eri púra ferdigur, segði venjarin, áðrenn hann saman við spælarunum fór út á vøllin at fagna áskoðarafjøldini, ið allan dystin á tamb gjørdi sítt besta fyri at bera kvinnurnar fram.



Kristian Mikkelsen, venjari hjá flogbóltskvinnunum, megnaði við sálarfrøði at geva teimum trúna aftur, so tær fingu vent finaluni og vunnið gullið
Mynd: Álvur Haraldsen

**FAKTA**

**Flogbóltur**
**Kvinnur, finala:**
Føroyar-Saaremaa 2-3 (12-25, 25-23, 25-18, 24-26, 16-14)
**Kvinnur, bronsudystur:**
Menorca-Bermuda 3-1 (25-18, 25-20, 22-25, 25-21)



**Føroysku flogbóltskvinnurnar høvdu allar orsøkir til at fegnast, eftir at tær fyrst líktust taparum, men síðani bardu seg upp og endaðu við at vinna fimmsettaran ímóti Saaremaa, ið ikki megnaði at standa ímóti, tá Føroyar stríddust og spældu upp á sítt besta**
Mynd: Álvur Haraldsen

## Hvør glaðari enn onnur

**Ongantíð hevur tað verið stuttligari at gingið millum flogbóltskvinnurnar við mikrofonini, enn tað var tað leygardagin, tí allar vóru so ovurfegnar og glaðar, sum tú bara ført verið tað, tá tú fyrst hevur verið í vanda fyri at mist alt – og síðani vinnur alt**

FLOGBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Tað var ein ótrúlig løta, ið staðfesti endan á oyggjaleikunum leygardagin, tá føroysku flogbóltskvinnurnar stóðu ovastar á sigurspallinum og tóku ímóti klappi og rópi frá teimum ótrúliga góðu áskoðarunum, ið høvdu verið við til at borið tær fram í meiri enn tveir tímar gjøgnum øll fimm settini í Baltichøllini í Mariehamn.

Ein fyri og onnur eftir fingu tær fyrst gullmerkið hongt um hálsin, ein útstappaðan kóp og síðani eitt heitt lógvatak sum viðurkenning fyri best hugsandi endan á leikunum í Álandi. Og tað var veruliga gleði og frøi, ið sást aftur í øllum andlitunum.

– Hetta er bara so deiligt. Eg trúði tí ikki, at vit skuldu vinna tann síðsta bóltin, men tað gekk. Tað sló bara klikk í høvdinum á okkum, men so tóku vit eitt »time-out« og komu sterkt aftur. Hetta var so spennandi, tí bæði liðini spældu líka, men vit vóru sterkari, segði Annika á Stongum.

Eisini Karin Mikkelsen ásannaði, at dysturin hevði verið ótrúliga spennandi: – Nógv stóð á okkum, so tað var ótrúliga gott, at vit kláraðu tað. Vit vóru øgiliga skuffaðar eftir byrjanina hjá okkum, tí hetta var so óáskoðaravinarligt, at hetta máttu vit gera betri. Eg haldi, at Saaremaa kann knekkast í so lætt, tá trýst verður lagt á, tí tá vit fingu minkað um feilirnar hjá okkum, sóu vit, at tær ikki kláraðu at standa ímóti, segði hon.

### Gull sum gávu

Fyri Helgu Guttesen mundi gullið kennast sum ein eyka føðingardagsgáva, tí leygardagin fylti hon 21 ár. Hon hevur undir leikunum drigist við skaða í rygginum, sum hon fekk í upphitingini til ein av fyrstu dystunum, og í sjálvari finaluni fekk hon ikki spælitíð: – Tað var ræðuligt at standa uttanfyri, so spennandi, sum heta var. Vit taptu fyrsta settið so syngjandi, men tíbetur kláraðu vit at taka okkum saman og vinna at enda. Hetta var heilt ótrúligt, segði hon.

Sólvá Dimon, ið fleiri ferðir undir finaludystinum vísti, hví hon hevur spælt í bestu svensku deildini og helst heldur fram í tí bestu donsku, var ovurfegin: – Vit kundu ikki fingið eina betri finalu. Vit byrjaðu bara so illa, men so vendi tað tíbetur hjá okkum, segði hon.

Ein av royndastu spælarunum á liðnum, Helen á Lakjuni, fekk ein avgerandi leiklut, tí hon átti seinastu servuna í dystinum, ið endaði við, at Føroyar fingu avgerandi stigið, ið tryggjaði sigurin: – Hetta er ordiliga deiligt og ein góð kensla. Hetta var øgiliga spennandi, og vit vistu, at vit fóru at fáa harða mótstøðu. Eftir fyrsta settið vistu vit, at vit dugdu betur enn so. Vit fingu at vita, at vit skuldu gloyma allar feilirnar og fara inn at gera tað, sum vit duga, og tað gjørdu vit so, segði Helen.